## DAGSINS MEINING

# Løgmansrøðan

Fyrsta løgmansrøðan hjá Jóannesi Eidesgaard var áhugaverd og ikki uttan visiónir. Røðan var áhugaverd, tí hon ítøkiliger tær ætlanir, sum landsstýrissamgongan hevur í sjalvstýrismálinum, og røðan var visioner, tí løgmaður gjørdi greitt, hvat fyri samfelag henda samgongan vil hava. Hartil er røðan áhugaverd, tí hon fevnir um klárar og greiðar útmeldingar. Hetta er galdandi fyri búskapin, fiskivinnuna, samferðsluna, umhvørvioð, fyri almanna- og heilsumál samt skúla- og mentanarøkið

Løgmaður legði dent á breiðu semjuna. Semjan leggur upp til, at vit fáa politiskan stabilitet og arbeiðsfrið, sum eru avgjørdar fortreytir fyri, at sett mál verða rokkin. Samgongan er breið, tí hon telur heili 21 tingfólk - hon er breið, tí hon fevnir rættiliga breitt politiskt. Men innihaldið í breiðu semjuni fevnir fyrst av øllum um málið at finna breiða loysn á nøkrum stórmálum. Her verður serliga hugsað um sjálvstýrismálið umframt neyðuga nýhugsan, tá tað snýr seg um vinnupolitisk tiltøk.

Sjálvstýrismálið skal leggjast soleiðis til rættis, at hetta ikki longur er eitt trætumál millum landsmenn, og soleiðis at øll tilgongdin nú verður á føroyskum hondum og ikki longur trætumál við danskar myndugleikar. Vit snøgt sagt føroyska ella yvirtaka sjálvstýrismálið.

Løgmaður legði dent á hetta, at sjálvstýrismálið skal gerast ein søk fyri ein breiðan meiriluta av føroyingum, har føroyingar sjálvir taka avgerðirnar innan teir karmar og tær heimildir, sum veruleikin gevur okkum. Hann segði, at í sjálvstýrismálinum eru fýra tættir nevniliga ein nýggj stjórnarskipa, ein yvirtøkulóginlóg, víðkaðar uttanríkispolitiskar heimildir og hernaðarsamtyktin. Við hesum leggur samgongan upp til at loysa teir størsta politiksu spurningarnar, ið upptaka føroyingar. Skal hetta eydnast, skal berast skjótt at og samgongan má vera púra samd. Eydnast at loysa hesar spurningar, fer samgongan uttan iva at halda í fíra ár, og hon fer at greiða allar aðrar spurningar við. Vit venda aftur til løgmansrøðuna í komandi oddagreinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Kære Leif Jacobsen

**Lisbeth L. Petersen**
*MF*



I forbindelse med vores telefonsamtale sender jeg som lovet de oplysninger, som jeg har fået fra skatteministeriet.

I dit læserbrev i Dimmalætting den 6. juli 2004 spørger du, om jeg vil være med til at ændre en urimelig skat i Danmark.

Hvis indkomstansættelsen for en person omfatter en kortere periode end et år, medfører personskattelovens § 14, at den pågældendes indkomst omregnes, så beløbet svarer til et helt års indkomst. Der beregnes herefter skatter af denne helårsindkomst. Men personen skal kun betale den del af de beregnede skatter, som forholdsmæssigt falder på indkomsten i den periode, den pågældende var skattepligtig. Baggrunden for reglen er, at den danske indkomstbeskatning er progressiv, så skattesatsen er højere for høj indkomst end for lav indkomst. Reglen skal fastholde progressionen for en person, som har en lav indkomst som følge af, at den pågældende alene er skattepligtig i en kort periode.

Helårsomregningen har bl.a. betydning i tilfælde, hvor personer, der er hjemmehørende i udlandet, udfører arbejde i Danmark i en kort periode og optjener en lille indkomst, idet personfradraget ellers ville bevirke, at de slet ikke skulle betale dansk skat eller alene skulle betale et beskedent beløb i dansk skat.

Beskatningen foretages altså under hensyn til en teoretisk beregnet helårsindkomst – men hvis denne indkomst afviger væsentligt fra den faktiske indkomst for det pågældende år, kan den få urimelige konsekvenser – som du jo også påpeger i dit læserbrev.

Problemet er dog faktisk allerede løst i forbindelse med vedtagelsen af EU-pakken i Folketinget (lov nr. 221 af 31. marts 2004). Helårsprincippet gælder stadig, men personer, som tilflytter og fraflytter Danmark, kan nu vælge at anvende deres faktiske helårsindkomst ved dansk skatteberegning i stedet for den beregnede helårsindkomst. Dette valg medfører, at der beregnes skatter af den faktiske helårsindkomst, men personen skal kun betale den del af de beregnede skatter, som forholdsmæssigt falder på indkomsten i den periode, den pågældende var fuldt skattepligtig.

Ændringerne har virkning fra og med indkomståret 2004. Det fremgår dog samtidig af loven, at personer, hvis skatteansættelse i tidligere indkomstår har omfattet en del af et år, skal have mulighed for at få ændret disse ansættelser. Disse personer kan vælge, at skatteansættelsen for indkomstårene 1996 - 2003 foretages efter den ny affattelse af personskatteloven § 14. Efter loven finder fristerne i skattestyrelsesloven for ekstraordinær genoptagelse anvendelse, men således at fristen på 6 måneder, efter at den skattepligtige er kommet til kundskab om det forhold, der begrunder fravigelsen af fristerne for ordinær genoptagelse, regnes fra lovens ikrafttræden. Loven trådte i kraft den 1. april 2004.

Personer, der er kommet i klemme i tidligere indkomstår, kan således henvende sig til skattemyndighederne for at få genoptaget deres sag.

# Tórshavnar Kamarkór í Listaskálanum

**Tórshavnar Kamarkór hevur konsert í Listaskálanum 1. august kl. 16.00**

**KONSERT**
*Tíðindaskriv*

Kórið hevur í allan vetur vant eina konsertskrá í sambandi vid, at kórið fer til Slesvig, nú býurin hevur 1200 ára hátídarhald.

Nógvir føroyingar vera í Slesvig í døgunum 5.-9. august. Har verdur kapp-róður, listaframsýningar, kórtónleikur og mangt annað.

Tórshavnar Kamarkór fegnast um stuðulin, sum kórið hevur fingið frá Mentanargrunninum, Tórshavnar Býráð og Norðurlandahúsinum. Harumframt hevur kórið fingið til vega fígging við at syngja eitt nú í SMS, í miðbýnum tá mentanarnáttin var, og til einstakar privatar veitslur, til tess at kunna gera ferðina so lagaliga sum til ber.

At kórið nú hevur konsert í Listaskálanum er eitt slag av nýhugsan - og samstarvið millum listargreinar, har tú sum áhoyrari fært eina heildarupplíving av kórtónleiki og málningalist.

Harumframt ber til at keypa sær ein kaffimunn í hugnaliga umhvørvinum í Listaskálanum.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Føroysk kvinna viðurkent dráp í Danmark

**Ein 48 ára gomul kvinna úr Føroyum, sum býr í Danmark, hevur játtað seg seka í at hava skotið ein 31 ára gamlan mann, sum hon fyrr hevur hildið saman við. Og hon sigur seg hava fingið hjálp til at fjala deyða mannin í eini frystiboks í einum úthúsi í Jyllinge**

**DRÁP**
*Eyðun Klakstein*

Ritzau skrivar, at drápið á tann 31 ára gamla mannin eftir øllum at døma varð gjørt fyri einum mánaða síðani, menn ikki fyrr enn týsdagin fann løgreglan líkið av manninum í frystiboksini.

Tann 48 ár gamla kvinnan úr Føroyum hevur sagt løgregluni, at tað var hon, sum skjeyt mannin, men umframt hana eru eisini fýra onnur fólk skuldsett í málinum.

– At ein persónur viðgongur seg sekan er ikki altíð tað sama sum, at hann sigur sannleikan, sigur Jørgen Kappel, sum er kriminalinspektørur hjá løgregluni í Roskilde.

### Fimm eru skuldsett

Løgreglan flutti týsdagin frystiboksin við líkinum til kanningar á Retsmedicinsk Institut, og endaliga eyðmerkingin av líkinum skuldi eisini gerast har.

Tey fimm fólkini, sum eru skuldsett í málinum, vórðu mikudagin varðhaldsfongslað í fýra vikur, og fýra av teimum skulu sita avbyrgd tær fyrstu tvær vikurnar.

Sambært ákæranum Jørgen Panum merkir hetta ikki, at tey øll hava verið við til at fremja drápið, men fólkini hava givið løgregluni ymiskar frágreiðingar, og tí skulu tey haldast frá hvørjum øðrum, meðan løgreglan kannar málið.

# Smyril Line stovnar skrivstovu í Týsklandi



**Smyril Line fer nú at styrkja sína støðu á týska marknaðinum við egnari skrivstovu í Kiel. Smyril Line Deutschland letur upp fyrst í september**

**FERÐAVINNA**
*Tíðindaskriv*

Smyril Line fer nú at menna sítt virksemi í Týsklandi, sum er størsti marknaðurin hjá felagnum. Fyrst í september letur Smyril Line Deutschland upp skrivstovu í Kiel, har tvey fólk fara at starvast.

Týska ferðamannastovan, J. A. Reinecke í Bargteheide stutt uttan fyri Hamburg, hevur verið aðalsøluumboð hjá Smyril Line, síðani felagið byrjaði sítt virksemi í Týsklandi í 1983.

– Samstarvið við J.A. Reinecke hevur verið sera gott, men skulu vit styrkja støðu okkara á týska marknaðinum, er neyðugt at vera til staðar har við egnari skrivstovu, sigur Jóanes á Váli, stjóri í Smyril Line.

J. A. Reinecke heldur fram at avgreiða ferðaseðlar vegna Smyril Line, tá tað snýr seg um ferðing úr Týsklandi í 2004, til Smyril Line Deutschland letur upp. Allir fyrispurningar um ferðing úr Týsklandi í 2005 skulu stílast til nýggju skrivstovuna:

**Smyril Line Deutschland**
Sell Speicher
Wall 55
24103 Kiel
Tel: 0431-200886
Fax: 0431-2008870
E-mail: deutschland@smyril-line.fo
www.smyril-line.de

# Sjúkrabilurin úr at gera

**ÓLAVSØKA**
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Portørarnir høvdu hendurnar fullar á ólavsøku. Teir høvdu úr at gera við at koyra fólk, ið var komið til skaða á ein ella annan hátt á skaðastovuna.

Tá tosað varð við løgregluna tíðliga fríggjamorgunin, hevði sjúkrabilurin verið úti samfullar 39 ferðir innan seinastu tvey samdøgrini.

Talan var tó ongantíð um nakað heilt álvarsamt. Tað var mest full fólk, ið vóru komin til skaða av fløskum og øðrum.

# Nógv full fólk

**ÓLAVSØKA**
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Um ólavsøkuna hevði løgreglan í høvuðsstaðnum úr at gera av øllum teimum fullu fólkunum, ið gingur runt og mólu í býnum.

30 ferðir tók løgreglan fólk upp í bilin, ið vóru komin illa fyri av brennivíni. Tey vórðu antin koyrd til hús ella í brummuna at sova rúsin av sær. Talið er ikki galdandi fyri allar tær ferðirnar, løgreglan hevur vakt avdottin fólk, tí tað talið er væl størri.

– Vit royna í størstan mun at koyra fólk til hús, tí hvørja ferð ein verður tikin inn á støðina, skal lækni tilkallast fyri at kanna viðkomandi. Læknin skal meta um, hvørt viðkomandi er egnaður til at sova í brummuni, ella um tað verður neyðugt at senda hann á Landssjúkrahúsið, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn.

Annars sigur løgreglan frá nógvum fullum fólkum, og tað eru ikki øll, ið hava skikkað sær eins væl. Løgreglan var fleiri ferðir úti fyri at steðga bardøgum.

Løgreglan hevur annars verið væl mannað um ólavsøkuna, og styrkur er eisini komin av bygd fyri at halda skil á ólavsøkugestunum. Eini 20-22 løgreglufólk hava verið til arbeiðis hvørt døgnið.

# Sigldu fullir

**ÓLAVSØKA**
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Ólavsøkunátt var løgreglan í Havn úti eftir einum fullum manni, sum hevði verið úti við einum báti. Hann verður skuldsettur fyri brot á sjólógina.

Beint eftir kapp-róðurin varð løgreglan aftur boðsend, tí tveir bátar sigldu við ávirkaðum skiparum.

Vakthavandi á politistøðini sigur, at talan var um ein mann, sum var óður og ikki vildi handtakast.

Teir høvdu eisini siglt á aðrar bátar, sum lógu stillir, og á politistøðini verður roknað við, at hetta verður meldað, og at menninir skulu gjalda eitt endurgjaldskrav. Teir eru eisini skuldsettir fyri brot á sjólógina.